# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Nei til bústaðarskatt

Samtak gjørdi fyrr í vikuni greitt, at tikið verður ikki undir við bústaðarskatting í Føroyum. Hetta burdi ikki komið óvart á Fíggjarmálaráðharran, sum herfyri í tíðargrein í Sosialinum tók spurningin upp til alment kjak, tó uttan sjálvur at taka støðu fyri ella ímóti bústaðarskatti.

Hjá vanliga føroyinginum eru sethúsini oftani einasta uppsparingin av týdningi, tey eiga. Eitt annað, sum ofta ger seg galdandi í Føroyum er, at fólk kunnu hava rættiliga ójavnar inntøkur gjøgnum lívið. Hetta er serliga galdandi hjá fiskimonnum, sum kunnu hava sera høgar inntøkur í eitt áramál, fyri síðani at fáa eina arbeiðsmannaløn seinni í lívinum, tá teir leggjast uppi, við lítlari ella ongari pensión at dúva uppá útvyir fólkapensiónina. Mangan er inntøkan tá farin í eini útgoldin hús.

Tað er mangan ósamsvar millum húsavirðið og húsarhaldsinntøkuna. Tað er soleiðis í Føroyum í mun til í øðrum londum, at nærum allir føroyingar óansæð sosialan status búgva í egnum húsum. Føroyingurin veit, at tá húsini eru goldin, so eigur hann tey. Um hetta ikki verður so í framtíðini, so er minni orsøk hjá láginntøkufamiljum at royna at seta føtur undir egið borð, tá tey allíkavæl kunnu risikera ikki at kunna sita í sínum dreymahúsum, tí at grannahúsini verða seld fyri milliónir.

Ein bústaðarskattur, sum skattar virðisøking, vil raka sosialt skeivt í Føroyum. Tann, sum hevur eina høga fasta løn, vil ikki koma so illa frá einum slíkum skatti, men fyri láginntøku familjuna, kann ein slíkur skattur tyngja nógv um.

Fyriuttan at tað er skeivt at skatta órealiserað virði, so tykist hugskotið eisini vera illa gjøgnumhugsað. Gamaní verður sagt, at pensionistar verða undantiknir. Hvat við teimum førunum, har ein hjúnaðarfelagi er fólkapensionistur og hin arbeiðir? Hvussu tá húsavirðið fellur. Fær borgarin so pengar aftur frá skattavaldinum?

Um tað stendur so illa til, at valið í dag stendur millum almennar sparingar ella bústaðarskatt, so má Fíggjarmálaráðharrin finna spariknívin fram. Hvar er betri at byrja enn á økinum, hann sjálvur varðar av? Eru møguleikar at finna sparingar her, og hvussu við øðrum almennum ráðum og stovnum í Føroyum heldur enn sum so oftani altíð at fara eftir pensionistunum, heimahjálpini, ja teimum veiku og sjúku!

At tosa um bústaðarskatt, sum rakar sosialt skeivt í Føroyum, er at styggja fólk burtur í einari tíð, har fólkafráflyting er í ferð við at gerast ein trupulleiki sum er.

Um føroyski Javnaðarflokkurin nú fer at tosa um bústaðarskatt í Føroyum, sum bara tiltalar fólki við høgum føstum lønum og góðum pensiónsuppsparingum, so er vandi fyri, at hann endar sum danski Javnaðarflokkurin, sum ikki hevur sitið við stjórnarvaldið seinnu árini m.a. tí, at hann er vorðin ov elitistiskur og tykist hava gloymt, hvat meinigi borgarin heldur.

**Sosialurin**

## Ikki grugga málið, Sjúrður Olsen!



**HEÐIN MORTENSEN**
borgarstjóri

Í lesarabrævi í bløðunum 6. januar 2009 hevst Sjúrður Olsen, býráðslimur, at meirilutanum í Tórshavnar býráð, fyri ikki at taka av tilboði uppá at umvæla og útbyggja ítróttar- og samkomuhøllina á Hálsi.

Lat meg fyrst staðfesta, at hvørki býráðslimir ella borgarar í Tórshavnar kommunu ivast í, at hond eigur at verða tikin um ítróttar- og samkomuhøllina. Men fyrsta treytin er, at skil er í tí, sum verður gjørt, og tí haldi eg tað vera harmiligt, at Sjúrður Olsen gruggar málið, tá hann starir seg blindan á kostnaðin fyri tekningar og prosjektering.

Rætt er, at býráðsmeirilutin ikki vildi taka av tilboðnum um at útbyggja og umvæla høllina á Hálsi, tí talan er um nógvar pengar at brúka upp á eina so gamla og slitna høll. Men harfyri er ikki sagt, at tann parturin av prosjektinum, sum snýr seg um umvæling, ikki skal gerast. Tí er talan als ikki um, at nakrir pengar eru farnir í vaskið, sum Sjúrður Olsen vil vera við.

Tvørturímóti er hetta enn eitt dømi um, at býráðsmeirilutin ikki arbeiðir í blindum ella ikki hevur tamarhald á teimum ætlanum, sum settar eru út í kortið. At siga, at vit einki fáa fyri pengarnar, er beinleiðis at grugga málið, tí tað hevur sjálvandi einki við veruleikan at gera.

Viðvíkjandi nýggja Argja skúla, sum býráðið hevur samtykt at byggja, kann í stuttum sigast, at hann verður bygdur sum upprunaliga ætlað. Men sum borgarstjóri vildi eg tryggja mær, at fíggjarligu viðurskiftini vóru í lagi, áðrenn nøkur endalig samtykt var gjørd. Tað sá tó ikki út til at telja nógv hjá Sjúrði Olsen!

Lat meg so, nú eitt nýtt ár er byrjað, bera fram eina vón um, at meiriluti og minniluti í Tórshavnar býráð standa saman um okkara kommunu, tí tað verður helst uppaftur meira neyðugt, enn tað hevur verið. Í øllum førum letur samtykta løgtingsfíggjarlógin ikki okkara gomlu tað stóra!

**Við nýggjárheilsan**

## Heilsan frá Klaksvíkini til Svínoynna?

**JÓGVAN EDMUND Á GEILINI**

Er jóla og nýggjársheilsanin frá Klaksvíkini til Svínoynna.

35% meira í kommunuskatti og ein brotnan samanleggingarsáttmála?

Skaldið tekur soleiðis til tá tað harmast um lagnuna, sum Dímunarseyðurin fekk á sinni

*Tykir mær tað harmiligt at*
*fara so um fæ*
*Fyrsta seyð í Føroyum var*
*meg listi enn at sæð.*

Í dag tykist tú ”Klaksvík tú Norðoya móðir” at vera svong. Er ætlanin at taka áseyðin av í Svínoy? Verður hildið at hann hevur tað betur tá hann hongur á ásini, ella tá bitin er svølgdur?

Vóni tað ikki.

Álitisbrot og sáðan av mistresti er ikki vegurin fram. Tað sum brúk er fyri er einum slóðara sum kann leiða fylgini fram, ikki minst tað avskorna fylgi á Svínoynni, soleiðis at lagnan ikki verður eins og tann hjá Dímunarseyðinum.

Í Svínoy bleiktra ljósini veikt í fleiri húsum, meðan onnur eru slóknaði, men satt er, lítil neisti kann birta bjartan loga, tí er tað altavgerandi at blásibjólgurin gevur tann rætta íblásturin.

**Góða eydnu við tí**

## Sambandsflokkurin og havdálking

**HANS JÁKUP OLSEN**

Edmund Joensen hevur í Dimmalætting grein um, at Sambandsflokkurin vil hava staðfest, hvør hevur ábyrgdina av, at grindahvalir eru so illa dálkaðir, at hvørki tvøst ella spik sambært landslæknanum er egnað sum mannaføði.

Alt gott um hetta uppskotið, sjálvandi er tað umráðandi at fáa staðfest hvør orsøkin til dálkingina er, og um vit kunnu gera nakað við tað.

Men tá Edmund í útvarpinum setir hetta uppskotið í samband við, at grindadráp er Føroysk mentan, og at vit missa hendan góða matin, so hongur ikki saman longur.

Edmund tú ert fremsti fortalari fyri ES limaskapi, um so verður, at Føroyar gerast limir í ES, so er síðsta grindin dripin í Føroyum.

Tá verður hvørki loyvt at drepa grind, skjóta fugl, ella taka havhestungar.

Tað er eisini ivasamt, um tað verður loyvt at fletta ein seyð í kjallaranum.

Taka vit Áland sum dømi, so er ikki loyvt at veiða fugl longur, tað er heldur ikki loyvt at seta gørn.

Tann dagin tað í Føroyum ikki er loyvt at drepa grind, skjóta fugl, taka havhestungar, seta gørn, fara á flot osv. tá vænti eg, at fleiri við mær siga, at tá kann mann tað sama búgva á Vesterbro.

Tú skrivar í greinini, at í áratíggju hava útlendingar funnist at føroyingum fyri at drepa grind. Nú er skjalprógvað, at størsta hóttanin kemur uttaneftir. Tíðin er komin at venda kanónunum.

Rætt hevur tú í tí, men tað finst ein enn størri hóttan móti hesum partinum av føroyskari mentan, og tað er Sambandsflokkurin.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo
Bergur Johannesen bergur@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.